# Býráðið

**Dagfesting:** 25.09.2025 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Gudny Vang fyri Ólavur Larsen, Linda Toftegaard fyri Eyðun á Lakjuni

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| | | |
|---|---|---|
| **Málsyvirlit** | | |
| **Til afgørelse** | | |
| 39/25 | 25/00207-5 | Innkalling av tiltakslimi fyri Ólavur Larsen 25. september 2025 |
| 40/25 | 25/00244-1 | Hølisviðurskiftini á Kambi |
| 41/25 | 25/00318-2 | Karmar fyri fíggjarætlanina 2026 |
| 42/25 | 25/00461-5 | Møgulig leiga av miðhæddini Toftagøta 1 til skrivstovur til kommunufyrisitingina |
| 43/25 | 25/00475-1 | Eykajáttan september 2025 |
| 44/25 | 25/00459-3 | Sandship søkir um byggiloyvi til høll |
| 45/25 | 25/00343-3 | Frárenning frá Berginum omanfyri Bergfrost |
| **Referatsager** | | |
| **Åben halv time** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

2

**Til afgørelse**

## 39/25
## 25/00207-5 Innkalling av tiltakslimi fyri Ólavur Larsen 25. september 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.09.2025 | 39/25 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing av málinum | Ólavur Larsen hevur boða frá at honum berst frá at møta á býráðsfundi í kvøld 25. september 2025. Sambært gerðabókini fyri kommunuvalið 12. november 2024, er fyrst valdi tilakslimur á lista Á, Gudny Vang við 49 atkvøðum og hevur hon játta at møta á fundinum í kvøld. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ólavur Larsen, hevur boða frá at hann ikki fær møtt til býráðsfundin 25 .september 2025 og hetta er fyrstu ferði í hesi valsetuni, at Gudny Vang tekur sæti, sum tiltakslimur. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | N |
| | Umsitingarligar | n | N |
| Tilmæli | Mælt verður til at býráðið tekur undir við at Gudny Vang tekur sæti fyri Ólav Larsen á býráðsfundinum 25-. september 2025. | | |
| Dagf | 25.09.2025 | | |

3

**Býráðið 25. september 2025:**
Gudny Vang hevur verið inni fyrr í hesi setuni og er tí ikki neyðugt við hesi samtykt.

**40/25**
**25/00244-1 Hølisviðurskiftini á Kambi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 07.04.2025 | 12/25 |
| 2 Sosiala nevnd | 21.08.2025 | 20/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2025 | 59/25 |
| 4 Býráðið | 25.09.2025 | 40/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **7. apríl 2025**<br>Á Kambi eru í løtuni fimm børn, ið hava serligan tørv. Stovnurin er væl normeraður í mun til børnini. Tann stóra avbjóðingin er hølisviðurskiftini, og at talan er um børn, sum ikki trívast millum 60 onnur børn. Børnini eru ofta atvoldin til stórar konfliktir, tí umstøðurnar eru avbjóðandi fyri tey. Í gerandisdegnum kenna tey seg kroyst, og tey vaksnu verða dagliga fyri harðskapi sum t.d. sligin, klípt, klórað, bitin og áspýtt.<br><br>Námsfrøðiliga skulu vit tryggja børnunum eitt tygt og gott umhvørvi, men á Kambi blíva hesi børnini ein ampi fyri seg sjávi og fyri onnur børn á stovninum. Fyri starvsfólkini blívur tað ofta fysiskt, tí tað gerst neyðugt at halda børnunum, fyri at fyribyrgja, at børnini gera skaða á seg sjálvi ella á pnnur. Tað er ein stórur og kompleksur spurningur og trupulleiki, at námsfrøðingar og hjálparfólk regluliga verða noydd at halda børnunum.<br><br>Trý av børnunum hava stuðul ein til ein meðan tey eru á Kambi. Hini tvey fáa eisini stuðul á stovninum, men eru ikki so fysiskt krevjandi og eru tí ikki stuðlaði ein til ein. Tvey av børnunum ganga í skúla. Hesi eru færri tímar á stovninum. Tvey av børnunum eru diagnostiseraði við ADHD, tvey bíða eftir at blíva greinaði, men væntandi er talan um ADHD og Autismu og eitt barn hevur down syndrom. Tað eru serliga trý av børnunum sum eru útvirkin.<br><br>Tey vaksnu klára uppgávuna væl, men uppgávan er trupul við verandi fysisku karmum. Øll 5 børn hava tørv á at sleppa til síðis, tí trupulleikin er serliga kemiin hjá barninum við onnur børn. Fyrrapartin gongur tað nøkurlunda, men um middagsleitið gerast teir fysisku karmarnir ein avbjóðing, tí tá eru 60 børn á |

4

| | |
|---|---|
| | stovninum. Børnini klára ikki væl upp við hvønn annan, tí ber illa til at samla tey í einum tilboðið.<br><br>Kommunan hevur ábyrgdina av at skipa tilboð til hesi børnin til tey eru liðug við 2. flokk<br><br>Leiðarin og varðaleiðarin á Kambi koma við til fundin hjá Sosialu nevnd og greiða gjøllari frá trupulleikunum.<br><br>**21. august 2025**<br>Býráðið bleiv kunnað um støðuna á Kambi á einum forfundi áðrenn summarferiuna. Síðani tá hevur stovnsleiðarin saman við sosialdeildarleiðaranum verið við fund við Dugna fyri at kannað, um tað er nakar møguleiki fyri at leiga hølinin frá teimum, meðan arbeitt verður við hølisviðurskiftunum.<br><br>Dugni hevur játta at leiga Fuglafjarðar kommunu hølir til frítíðarskúlavirksemið meðan arbeitt verður við hølisviurskiftini á Kambi. Talan er um 266 km2. Húsaleigan verður kr. 858,00 kr. pr m2 uttan mvg. svarandi til kr. 23.778,00 pr mðr. prísuppskotið frá Dugna svarar til tað leiguinntøka stovnurin hevur fingið frá miðnámsskúlanum fram til summarferiuna.<br><br>Leiguútreiðslan skal eftir ætlan gjaldast á rakstrarstað 320 Kambur – húsaútreiðslur. Her var peningur settur av til at gera túnið uttanfyri Kamb, men verkætlanin er útsett til vit vita, hvussu ætlanirnar á Kambi koma at síggja út. Tí er ikki neyðugt við eini eykajáttan til leiguútreiðslurnar fyri inniverandi ár. Eftir ætlan, skal kommunan leiga hølini frá 1. September 2025. Tvs. húsaleigan fyri inniverandi ár verður góðar 95.000 kr. hertil koma útreiðslur til at seta ein leysan vegg upp, so vit hava nokk hølir, so børnini við serligum tørvi kunnu skermast meðan tey eru á stovninum. Hettar krevur heldur ikki eina eykajáttan.<br><br>Av tí at talan verður um eina fasta mánaðarliga útreiðslur sum svarar til kr. 285.336 kr. árliga til onnur loysn verður funnin, verður málið lagt politiska viðgerð, áðrenn leigusáttmáli verður undirskrivaður.<br><br>**18. September 2025**<br>Sosiala nevnd samtykti á fundi í august, at avtala kundi gerast við Dugna um leigu av hølum. Málið verður, saman við einari leigusáttmála millum Dugna og Fuglafjarðar kommunu, sent til víðari viðgerð í fíggjarnevndini og býráðnum. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Avbjóðingar við teimum fysisku karmunum á kambi |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | • Møgulig fylgiskjøl |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | X |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | **7. apríl 2025**<br>Málið verður lýst gjødliga á fundinum. Mælt verður til, at Sosiala nevnd tekur støðu til, hvusu arbeiðast skal víðari við málinum<br><br>**21. august 2025**<br>Mælt verður til, at sosiala nevnd tekur støðu til, um Kommunan skal leiga hølini frá Dugna til frítíðarskúlavirksemið á Kambi meðan arbeitt verður við hølisviðurskiftunum á Kambi.<br><br>**18. september 2025**<br>Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur støðu til, um kommunan kann leiga hølini frá dugna til Frítíðarskúlavirksemið á Kambi meðan arbeitt verður við hølisviðurskiftunum á Kambi | | |
| Dagf | 03.04.2025 og 19.08.2025 | | |



**Sosiala nevnd 07. april 2025:**
Stovnsleiðarin og Varðaleiðarin á Kambi vóru við á fundinum og greiddu frá avbjóðingunum við børnum við serligum tørvi sum ganga á Kambi í løtuni. Tað er akut tørvur á at loysa hølistrupulleikarnar. Sosiala nevnd er á einum máli um, at arbeiðast má við einari akuttari loysn, men eisini við einari varandi loysn. Neyðugt er at leggja málið fyri fíggjarnevndina ísv. umbøn um eykajáttan. Sosialdeildarleiðarin arbeiðir víðari við hesum.

**Sosiala nevnd 21. august 2025:**
Sosiala nevnd samtykti, at avtala kann gerast við Dugna um at leiga hølini pr. 1. september. Málið verður sent víðari til viðgerð í fíggjarnevndini og Býráðnum har avgerð skal taka endaliga avgerð um leigusáttmála fyri komandi fíggjarár.

**Fíggjarnevndin 18. september 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir býráðnum til at taka undir við sáttmálanum.

**Býráðið 25. september 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**41/25**
**25/00318-2 Karmar fyri fíggjarætlanina 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.05.2025 | 43/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2025 | 50/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.09.2025 | 61/25 |
| 4 Býráðið | 25.09.2025 | 41/25 |

**Tilráðing**

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Fíggjarnevndini og býráðnum</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td colspan="3">Beint eftir summarfrítíðin byrjar ítøkiliga arbeiðið við at fáa snikka eina fíggjarætlan til fyri 2026.<br><br>Tí verður hol sett á arbeiðið í fíggjarnevndini at viðgera tey viðurskifti, sum eru avgerandi fyri fíggjarútlit og fíggjarstøðu komandi árið.<br><br>Viðfest er notat har hesi viðurskifti eru viðgjørd.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Í seinasta lagi 1. desember 2025 skal fíggjarætlanin fyri 2026 vera góðkend og skulu nevndir og býráð í góðari tíð frammanundan viðgera rakstur og íløgur fyri komandi árið.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>Møgulig fylgiskjøl<br>• Notat um yvirskipaðar karmar fyri 2026<br>• Lán hjá FK - juni 2025<br>• Fyribils meting av eftirlønarskatti og flytingum vegna DIS,FAS<br>• 4203 - Fuglafjørður - Fyribils 2026 - 31-08-2025<br>• Fíggjarætlan 2026</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>j</td><td>J</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>j</td><td>J</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Mælt verður til at Fíggjarnevndin metur um og tekur støðu til:<br>• Væntaðar inntøkur komandi árið<br>• Skattaprosent og aðrar inntøkumøgulleikar<br>• Frádráttir<br>• Prís og lønarvøkstur<br>• Útreiðslukarm fyri rakstur<br>• Íløgurkarm<br>•<br>**Til fíggjarnevndarfundin 20.06.2025**<br>Mælt verður til at fíggjarnevndin út yvir punktini til fundin 23.05.2025 eisini umrøður tilgongdina til FÆ2026(nevndarviðgerðir v.m.) og tilgongd við lántøku.<br><br>**Til fíggjarnevndarfundin 18.09.2025**<br>Sambært §39 stk. 1. Í kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin innan 1. oktober leggja uppskot fyri býráðið um fíggjarætlan fyri 2026.<br><br>TAKS kom 2. September við fyrstu inntøkumetingini fyri 2026, sum ljóðar uppá góðar 88 mió. ella 7,4 mió. kr. hægri enn fyri 2025. Fíggjarmálaráðið metur at eftirlønar skatturin komandi ár verður 21,2 mió. kr. fyri 2026, 2,8 mió. kr. hægri enn fyri 2025. Endurgjaldið fyri DIS/FAS verður 2,7 mió. kr., 329 tkr. hægri enn í 2025.<br><br>Ein framskriving við 4% lønarhækkan og óbroyttum rakstri annars, við kendum broytingum vísur at raksturin fyri 2026 verður umleið 90,6 mió. kr. í, 2,5 mió. kr. ella 2,8% hægri enn í 2025.<br><br>Á løgusíðuni er greitt at kommunan hevur bundið seg í sáttmálum til 40 mió. kr. og ikki slepst undan at gera nakrar átrokandi íløgur.<br><br>Mælt verður til at fíggjarnevndini at taka undir við einum fíggjarkarmi Á 91 mió. kr. áðrenn rentur og avdráttir og einum íløgukarmi á 50 mió. kr. fyri 2026.<br><br>Neyva býtið verður viðgjørt av býráðnum á Hotel Vágum 23. Og 24 . oktober 2025. |
| Dagf | 22.05.2025 |

**Fíggjarnevndin 23. maj 2025:**
Fíggjarnevndin umrøddi málið leysliga og tekur tað upp aftur á komandi fíggjarnevndarfundi áðrenn tilmæli verður lagt fyri býráðið um karmar 2026.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2025:**
Fíggjarnevndin hevur hesar viðmerkingar til punktini í tilmælinum:

- Væntaðar inntøkur komandi árið:
  - A&B skattur verður ásettur av TAKS í august mánaða. Vanliga verður hetta varisliga ásett.
  - Stór óvissa er um partafelagsskattin og mælt verður til at tað í mesta lagi verða settar 17 mió. kr. av.
  - Avtala um havnaútbygging við Ennibryggjuna ger, at inntøkurnar av vørugjaldi alt annað líka koma at minka komandi árini. Um nøgdirnar vaksa kemur hetta at mótvirka minkingina.
- Skattaprosent og aðrar inntøkumøgulleikar
  - Í fyrstu syftu verður hildið fæst við verandi skattaprosent uppá 21 ¼. Møgulig broyting verður tikin upp í endaligu samráðingunum um FÆ2026.
  - Heitt verður á nevndirnar um, at gjøgnumganga gjøldini á økinum og koma við uppskoti til prístalsreguleringar og/ella javningar. Eisini verða nevndirnar bidnar um at kanna um nýggj gjøld skulu setast á tænastur.
  - Kannast skal um Fuglafjarðar kommuna skal krevja gjald fyri tóm hús, sambært nýggju heimildini og hvat gjaldið eventuelt skal vera.
- Frádráttir
  - Barnafrádrátturin verður óbroyttur 2026 uppá 8.500,- kr.
- Prís- og lønarvøkstur
  - Roknað verður við einum generellum lønarvøkstri uppá 4%, men nevndirnar mugu fyri hvørt rakstrarstað roknað aktuella tørvin á lønarkrónum.
  - Nevndirnar mugu gjøgnumganga rakstrarstøðini og koma við ítøkiligari meting um prístalsregulering.
- Útreiðslukarmur fyri rakstur
  - Heitt verður á nevndirnar um í fyrsta lagi, at fáa fastlagt raksturin á ymisku rakstrarstøðunum, tá hesin er avgerandi fyri hvat rúm er fyri av íløgum. Serliga eigur, at verða hugt eftir møguleikum fyri sparingum.
- Íløgukarmur
  - Tað er longu disponeraðar nógvar íløgur komandi árið m.a. havnaútbygging 10 mió. kr., 64-skúlin 20 mió. kr. netto, kirkjugarður v.m. Tí er ikki pláss eftir til nógvar aðrar íløgur og nevndirnar verða bidnar um bert, at koma við íløguynskjum, sum eru alneyðug til tær tænastur kommunan hevur ábyrgd av at veita borgarunum.
- Lántøka:
  - Væntandi verður neyðugt við lántøku upp ímóti 60 mió. kr. komandi tvey-trý árini til havnaútbygging og umvæling av 64-skúlanum. Fíggjarnevndin mælir umsitingini til, at gera ein likviditetsprofil fyri komandi trý árini og út frá tí fara í samráðingar við føroysku bankarnar um fleksiblar lánimøguleikar út frá likviditetstørvinum.
- FÆ2026 tilgongd:
  - Heitt verður á nevndirnar um beinanvegin eftir summarferiuna at fara í gongd við FÆ2026 arbeiðið.
  - Karmarnir verða meldaðir út 1. September.
  - Miðað verður ímóti, at alt býráðið við deildarleiðarum setir 2 dagar av í oktober mánaða har seinastu tillagingarnar verða fingnar uppá pláss.

10

- 1. Viðgerð er eftir ætlan 30. Oktober, í seinasta lagi 13. november og 2. Viðgerð verður 27. november.
- 1. Desember er seinasta freist, at lata FÆ2026 inn til Fíggjarmálaráðið

**Fíggjarnevndin 18. september 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við karmunum, sum grundarlag fyri eini endaligari fíggjarætlan býtt á rakstur, løgur á ymisku rakstrarstøðunum.

**Býráðið 25. september 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við karminum fyri 2026.

**43/25**
**25/00475-1 Eykajáttan september 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.09.2025 | 62/25 |
| 2 Býráðið | 25.09.2025 | 43/25 |
| 3 Býráðið | | |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Ein gjøgnumgongd av fíggjarstøðuni á ymisku rakstrarstøðunum vísir, at tað er tørvur á at tillaga játtanina fyri 2025, við eini eykajáttan.<br><br>Talan er um íalt 1.063 tkr. býtt á hesi rakstrarstøðini:<br><br>RS120: Felagsútreiðslur, kommunufyrisitingin, 200 tkr. vegna øktar licens og skeiðsútreiðslur.<br><br>RS130: kommunuskrivstovan, 300 tkr. vegna øktar útreiðslur til uttanhýsis ráðgeving í samband við at tað tók tíð at fáa mannað fíggjarleiðarastarvið og tí at tillagingarnar í starvsfólkahópinum tóku longri tíð at fáa fullan virknað enn ætlað var frammanundan.<br><br>RS532: Kunning um kommununa, 120 tkr. vegna, nakað dýrari prenting en mett, innlesing av bind 1(ljóðbók) og tiltak í samband við bókaframølguna.<br><br>RS540 Mentanarhúsið: 215 tkr., sum eru eyka útreiðslur í samband við leiðaraskifti.<br><br>RS390 Ung í arbeiði og tiltøk til børn: 158 tkr. har størst parturin er vegna stóra áhuganum hjá ungum at taka lut í «ung í arbeiði».<br><br>RS224 Kommunulæknin: 70 tkr. sum skyldast øktar útreiðslur við tað at lutfalsliga nógvir vikarar hava røkt tænastuna higartil í ár. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Tørvur er á eykajáttan á nøkrum rakstrarstøðum. Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin koma við uppskoti, sum skal viðgerast 2. ferðir á býráðsfundi við í minstalagi 14 daga millumbili. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin og kommunustýriskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu. |

14

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Møgulig fylgiskjøl**<br>Eykajáttan øki 4 og 5<br>Umbøn um eykajáttan - øki 2 og 3<br>Rakstur til dato við fíggjarætlan 2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | J | N |
| | Umsitingarligar | N | N |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur undir við eykajáttanini, at peningurin verður tikin av innistandandi og sendur hana til 1. viðgerð í býráðnum. | | |
| Dagf | 16.09.2025 | | |

**Fíggjarnevndin 18. september 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum.

15

**Býráðið 25. september 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og sendir málið víðari til 2. viðgerð.

**44/25**
**25/00459-3 Sandship søkir um byggiloyvi til høll**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 15.09.2025 | 21/25 |
| 2 Býráðið | 25.09.2025 | 44/25 |
| 3 Býráðið | | |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndin, Býráðið | | |
| Stutt lýsing av málinum | Sandship søkir um byggiloyvi til høll á havnalagnum í Fuglafirði. Hin 29. august 2024 hevur býráðið í Fuglafjarðar kommunu einmælt samtykt at geva Sandship eina tilsøgn um at byggja goymslubygning á økinum har nýggja bryggjan hjá Framherja og Pelagos verður gjørd. Í tilmælinum og tilsøgnini verður loyvið givið ímóti at Sandship frásigur sær byggiloyvi á økinum millum matr. 239c, ogn hjá Framherja og matr.nr. 292, sum er ogn hjá Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag.<br>Sandhip hevur nú sent tekningar og tilfar til Fuglafjarðar kommunu, har teir søkja um byggiloyvi til høll.<br>Staðsetingin má endurskoðast, fyri at lúka fráleikakrøvini, annars hevur umsitingin ikki nakra viðmerking til umsóknina. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Øll byggiloyvir til vinnubygningar verða viðgjørdir í vinnu- og havnanevnd og býráðið áðrenn byggiloyvi verður givið. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Býráðssamtykt frá 29.08.2024<br>• Tilsøgn um byggiloyvi – skriv til Sandship<br>• Byggiloyvi til høll á matr.nr. 594 í Fuglafirði | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Tekniska umsitingin viðgerður byggiloyvi út frá teimum galdandi byggisamtyktum á økinum, og mælir til at byggiloyvi verður givið sambært tekningum og skjølum í málinum. Og við tí treyt at Sandship frásigur sær byggiloyvi á økinum millum matr. 239c, ogn hjá Framherja og matr.nr. 292, sum er ogn hjá Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag. | | |
| Dagf | 08.09.2025 | | |

16

**Vinnu- og havnanevndin 15. september 2025:**
Vinnu- og havnanevndin fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

17

**Býráðið 25. september 2025:**
Borgarstjórin mælir til at endaliga byggiloyvið ikki verður givið fyrr enn kommunan hevur fingið fatur á lendinum. Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini og ískoytinum frá borgarstjóranum.

## 45/25
## 25/00343-3 Frárenning frá Berginum omanfyri Bergfrost

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 10.06.2025 | 16/25 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 15.09.2025 | 22/25 |
| 3 Býráðið | 25.09.2025 | 45/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Trupulleikin í stuttum:<br>Articon hava í samband við arbeiði, at gera nýggju frysti- og goymslutunlarnar til Bergfrost, havt stórar trupulleikar av nógva vatninum ið kemur í rennuna framvið berginum. Tað er bæði talan um vatn ið rennur niður av berginum, men eisini vatn ið kemur gjøgnum rennuna, frá økinum uttanfyri tunlarnar. Articon hava haft pumpur standandi við báðar tunnilsmunnarnar, ið hava pumpa vatnið í tað nærmastu frárenningina – ið er við verandi Bergfrosttunnil.<br>Rennan framvið berginum er sera grunn, og tað er trupult at dýpa hana millum bergið og trafostøð og kølimaskinurnar. Tí hópast vatnið bara upp við tunlarnar, og hesin trupuleikin verður bara størri tá tvær nýggjar innkoyringar koma til tunlarnar, ið bróta grøvina meira av.<br><br>Møgulig loysn:<br>Leggja eina nýggja frárenning frá berginum út á sjógv og leggja rør undir innkoyringarnar til tunlarnar, so vatni kann renna til nýggju frárenningina.<br>Hetta kann gerast í samband við, at Bergfrost skal leggja eina kølivatnsleiðing út á sjógv. Hendan leiðingin skal brúkast til tað nýggja kølianleggið ið er staðsett inni í tunlunum. Við at deila grøvina út á sjógv, kann hetta gera leiðingin bíligari fyri báðar partar. |

18

| | |
|---|---|
| | Fuglafjarðar havn hevur í fleiri ár arbeitt við, hvussu man kann koma við einari loysn til rennurnar, ið ikki svølgja vatnið sum rennur niður av berginum og frá økinum um tunlarnar. Í 2024 bleiv arbeitt við at hækka rennuna, og var kostnaðurin tá 1.000.000kr og bleiv ikki raðfestur í FÆ2024.<br>Kostnaðarmeting av hesum:<br>320.000 kr. u/mvg. fyri partin hjá Fuglafjarðar kommunu fyri rennuna, hetta eru prísir frá Articon, sum ger arbeiði fyri Bergfrost. Afturat hesum kemur rørleiðing og ein brunnur á 45.980kr + mvg fyri rørleiðingina + arbeiðsløn at leggja rørini á ein mettan prís á 45.000kr og gjøgnumføringin í spunsvegg á ein mettan prís á 15.000kr + mvg.<br>Samlaði kostnaðurin við øllum er uml. 500.000kr + mvg (425.980kr + mvg).<br>Tekniski leiðarin hevur tosað við havnastjóran sum hevur eitt stórt ynski um at hetta verður gjørt. Hann sigur at tað ofta eru trupulleikar, av tí at vegurin hellur niðaneftir frá vegmiðjuni og at tað alt ov ofta flýtur yvir.<br><br>**09.09.2025**<br>Nýggju upplýsingar eru komnir síðani seinastu viðger.<br>Um Articon skal gera arbeiði eftir graviloyvinum so verður verkætlanin væl dýrari uml. 1.952.000,- kr. enn ávur upplýst.<br>Fundur var millum partarnar 05.09.25 har møguleikar blivu umrøddir. Niðurstøðan bleiv at leggja eitt Ø500 trýstrør til áarvatnið. Hettar fyri at leiðingin kann broytast til eina pumpuleiðing um tørvur verður á tí. Ein áboring verður gjørd uppi við munnan so klárt er at íbinda eina møguliga pumpuskipan um tað skuldi verði neyðugt.<br>Í verandi løtu er bert eitt Ø160 rør, ið leiðir vatn út á sjógv frá berginum. Hettar er alt ov lítið til alla vatnmongdina, ið samlast í økinum.<br>Tekniska deild vil tí uppstiga og framtíðartryggja hesa frárenning so hon kann nøkta frárenningina í hesum økið. Nýggj kostnaðarmeting er gjørd av Articon av broyttu ætlanini. Nú er kostnaður mettur til uml. 700.000,- kr.<br><br>Um tað vísir seg at vera neyðugt at pumpa vatnið burtur er talan um eina munandi størri íløgu. Pumpuskipanin við Ø315 rørið er mett til at kosta uml. 1,0 mio. (Grundfoss). Her verður neyðugt at innheita fleiri tilboð frá ymiskum veitarum. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Fyrispurningur er komin frá Bergfrost um at leggja kølivatnsleiðing út á sjógv. Bergfrost hevur víst á trupulleikan við vatninum frá berginum og spyr um Fuglafjarðar kommuna er áhuga í at gera eina frárenning frá rennuni samstundis.<br>Fuglafjarðar kommuna hevur spurt um prís frá Articon um kostnað og annan veitara um rør. |

19

| | | | |
|---|---|---|---|
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Princip skurður frá bergi og oman á kajkantin | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Til politiska støðutakan um Fuglafjarðar kommuna skal gera frárenning<br>Til politiska støðutakan um Fuglafjarðar kommuna skal gera frárenning samstundis sum Bergfrost leggur kølivatnsleiðing út á sjógv. Um ja, so at hetta verður fíggja av RS750, viðlíkahald.<br><br>**Nýtt tilmæli:**<br>Við einari loysn við einum Ø500 trýst røríð til frárenning hevur kommunan tryggja sær báðar loysnir. Tvs. regnvatnið kann renna natúrligt (gravitation) og um neyðugt kann leiðingin brúkast til pumpuleiðing. | | |
| Dagf | 05.06.2025 – dagf. Tann 09.09.2025 | | |



**Vinnu- og havnanevndin 10. juni 2025:**
Havnameistarin var við til fundin og greiddi frá hvør trupulleikin við rennunum. Hann sær ikki nýtt drenrør sum eina loysn, av tí at størsti trupulleikin er at rennan er ov lág framvið berginum. Rennan er liggur javnt við sjógvstandin. Einasta loysnin er at seta pumpu á, sum fer í gongd tá ið tað er flóð.
Vinnu- og havnanevndin taka frágreiðingina hjá havnameistaranum til eftirtektar og mæla ikki til at leggja nýtt drenrør í, men heldur finna eina loysn við pumpu, sum fer í gongd tá ið flóð er.

**Vinnu- og havnanevndin 15. september 2025:**
Jóan Pauli Olsen og Kristian Martin Petersen mæla til at leggja Ø500 rør og tryggja sær báðar loysnirnar. Ørvar Jacobsen mælir ikki til at leggja rør men heldur fast í loysnini við pumpu. Ørvar Jacobsen sendur málið víðari í býráðið.

**Býráðið 25. september 2025:**
Býráðið atkvøddi um málið har 6 atkvøddu fyri og 3 atkvøddu ímóti. Fyri atkvøddu Eivin Breiðaskarð, Jóan Pauli Olsen, Linda Toftegaard, Kristian Martin Petersen, Gudny Vang og

Dávur Juul. Ímóti atkvøddu ímóti Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen og Jastrid á Dalbø. Tilmælið frá meirilutanum í Vinnu- og Havnanevndini 15. september 2025, varð sostatt samtykt.

22

Referatsager

| **Saknr** | **Arkivsak** | **Tittel** |
| --- | --- | --- |

23

| | | |
|---|---|---|
| 1/25 | 25/00456-4 | Kunning um ástaðarfund við Vónina um økið omanfyri bygningin |

24

Fundurin lokin kl. 21.30

Dávur Juul

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Linda Toftegaard

Jóan Pauli Olsen

Gudny Vang

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen